# Uttan tunnilin var økið fátækari

**Borgarstjórin á Akranesi í Íslandi er ikki í iva um, at var Hvalfjarðartunnilin ikki komin, var økið kring Akranes fátækari, enn tað er í dag**



*Væl av fólki lýddi við áhuga á framløguna hjá íslendska borgarstjóranum í fimleikarhøllini í Sørvágs Skúla hóskvøldið*
*Mynd: Edvard Joensen*

TUNNILSFUNDUR
*Edvard Joensen*

Sørvági:
Hvalfjarðartunnilin hevur havt framburð við sær á Akranesleiðini, segði Gisli Gislason, borgarstjóri á Akranesi í Íslandi, á almennum fundi, sum Vága Vinnufelag skipaði fyri í Sørvági hóskvøldið.

Gisli Gislason kendi seg sannførdan um, at Vágatunnilin eisini fer at hava mennandi ávirkan á gongdina í Vágum sum heild. Men treytin er, at vágafólk duga at taka við teimum fyrimunum, sum koma við tunlinum og sálda vansarnar frá, segði hann.

Tað var væl av fólki møtt á fundi í fimleikarhøllini í Sørvágs Skúla hóskvøldið at lurta eftir borgarstjóranum á Akranesi og seta honum spurningar eftir frágreiðing hansara.

Gisli Gislason var eftir innbjóðing frá Vága Vinnufelag komin til Føroya at greiða frá royndum teirra á Akranesi av undirsjóvartunlinum undir Hvalfirði. Og eingin, sum var á fundi, var eftir framløgu hansara í iva um, at hann metti tunnilin sum eina góða íløgu.

### Dupultur prísur

Hvalfjarðartunnilin kostar umleið dupult so nógv, sum Vágatunnilin er settur at kosta. Einar 500 milliónir krónur í okkara peningi, greiddi Gisli Gislason frá. Tó var kostnaðurin fyri sjálvan tunnilin umleið 350 milliónir danskar krónur, meðan restin fór til kanningar og ráðgeving av ymsum slagi.

Men hann ivaðist ikki í, at íløgan var rætt givin út, og hann væntaði heldur ongan trupulleika av at fáa peningin innaftur.

Gjaldsfreistin varð sett til 20 ár, tá tunnilin lat upp í 1998, og sum støðan er í løtuni, bendir alt á, at tað fer at eydnast at gjalda aftur til tíðina, segði borgarstjórin á Akranesi.

Ferðslan um Hvalfjørðin var, áðrenn tunnilin lat upp, umleið 1.200 bilar dagliga. Væntað varð, at tá tunnilin varð tikin í nýtslu, fór talið at økjast til einar 1.500 bilar. Men tá avtornaði, var talið komið upp á 2.800 bilar dagliga. Í fjør var talið komið upp á umleið 3.400 bilar um dagin, greiddi hann frá.

Áðrenn tunnilin lat upp, varð ferðast um fjørðin við ferju, eins og koyrandi eisini er kring allan fjørðin.

Hóast annar møguleiki er at koyra til Reykajvíkar, ella øvugt, fram við Hvalfirðinum, er tað so at siga bara tunnilin, sum verður nýttur. Eisini hóast tað einki kostar at koyra eftir gamla vegnum. Men hann er nógv longri. Einar 100 km., sum tað tekur umleið fimm korter at koyra, meðan leiðin undir firðinum er 40 km., og tekur umleið ein hálvan tíma at koyra.

### Onnur ávirkan

Tað er eitt sindur ymsikt, sum tað merkist á Akranesleiðini, at tunnilin er komin, segði Gisli Gislason.

Andstøðingarnir móti tunlinum ávaraðu ímóti, at eitt nú handilslívið fór at verða fyri bakkasti, og at ungfólki fór at rýma til Reykajvíkar, um tunnil kom.

Men tað øvugta hendi. Væl var onkur handil, sum ikki kláraði kappingina, men tað vóru mest slíkir, sum ikki vóru nóg væl riknir frammanundan. Aðrir, sum dugdu at tillaga seg, komu væl frá avbjóðingini við bæði betri tænastu og betri rakstri.

Akranes Kommuna hevur gjørt nógv fyri at halda fólkinum á staðnum. Eitt nú ítróttarfólkinum. Kommunan hevur ikki stuðla rakstrinum beinleiðis, men heldur lagt pening í hallir og vallir. Eitt nú ein golfvøll fyri meira enn tólv miliónir í okkara peningi hevði kommunan latið gjørt, segði borgarstjórin á Akranesi.

Men betraða sambandið hevði eisini havt við sær, at grundstykkja- og summarhúsprísirnir vóru hækkaðir, eins og eftirspurningurin var øktur munandi.

Og jarðarprísurin var bæði tví- og trýfaldaður, nú so lætt er at koma úr Reykjavík á Akranes. Serliga hestamenn vilja hava jørð uttan fyri stórbýin, seðgi Gisli Gislason.

Í aðrar mátar vóru upplivingarnar, tey á Akranesi hava havt, á leið tær somu, sum vágafólk longu nú duga at síggja í sjónarringinum.

Eitt nú segði Gisli Gislason, at bummpengaprísin fingu tey ikki at vita, fyrr enn einar tveir mánaðar áðrenn tunnilin lat upp.

Men slíkt skulu vágafólk ikki óttast, helt hann. Tað liggja ókendir møguleikar í tunlinum, ivaðist hann ikki í við egnum royndum sum grundarlagi.

Og duga vágafólk at síggja fyrimunirnar og nýta teir, samstundis sum vansarnir helst skulu skiljast frá, verður tað bara framburður fyri oynna, tá tunnilin letur upp, heldur borgarstjórin á Akranesi í Íslandi, Gisli Gislason.

– Nú standa tit við bóltinum fyri opnum máli, og so er tað tykkara uppgáva ikki at brenna, segði hann.

# Skótaárbókin komin

SKÓTAR
*Ingrid Bjarnastein*




Føroya Skótaráð hevur aftur í ár útgivið skótaárbókina »Skóti«, sum verður latin ókeypis til allar skótar í Føroyum.

Hesuferð telur útgávan 192 blaðsíður. Dagføring er gjørd av álmannakkanum, skránni hjá samskiparunum, adressulistanum, og eisini eru fleiri aðrar síður í bókini. Talan er um nýggjar hugskotsíður og eftir ynski eru eisini fleiri sangir við í hesi útgávuni.

Bókin er úkomin í 2000 eintøkum. Kári Olsen hevur lagt bókina til rættis. Filmir eru gjørdir hjá Hestprent, meðan prenting og bókabinding er gjørt hjá Einars Prent.

# Tjørnuvíkingar fara út á Stakkin

**Í morgun ætla tjørnuvíkingar sær út á Stakkin at taka seyð**

STAKKURIN
*Ingrid Bjarnastein*

Eftir ætlan fara tjørnuvíkingar út á Stakkin í dag, leygardag. Teir møtast niðri á Grund, og síðani gongur leiðin út á Stakkin at taka seyðin, ið har gongur. Fyrst verður boðið vælkomið, og síðani verður sungið áðrenn farið verður til gongu.

Nógv eru, ið fara av húsi fyri at uppliva henda túrin, og eisini er stórur áhugi millum avbygdafólk at vera við á ferðini.

Vanliga verður farið til gongu klokkan 8 á morgni, og komið verður aftur umleið klokkan 13.

Í ar veru 14 seyðir at taka. Sjey lomb, seks ær og ein veðrur. Fýra lomb verða flett við tí í hyggju at selja tey í stykkjum. Vanliga er kiloprísurin fyri hesi lomb ógvuliga góður.

Eisini verða nakrir lundar seldir á uppboðssølu, og plaga eisini teir at hvaa sera góðan prís. Vanliga verður uppboðssølan hildin klokkan 18.

Peningurin, ið inn kemur, fer til viðlíkahald av Stakkilinum.

Dagurin endar við dansi í bygdarhúsinum, har Cocktail spæla til dans.

Vikuskifti
Nr. 181 • leygardagur • 21. september 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

**11. september 2002**



– Runt alt landið sótu fólk í tøgn og lurtaðu eftir nøvnunum. Mintust. Stemningurin var sera syrgiligur, og tú merkti veruliga, hvussu neyvt álopini høvdu rakt, skrivar Halla Nolsøe Poulsen úr Washington

Lesið síðu 4 og 5



*Gamli línuleypurin liggur nú fúnaður á onkrum neystalofti ella undir tróðrinum í onkrum hjalli*

# Línuleypurin

Tað, sum fortíðin gav og lærdi okkum, eiga vit í framtíðini at liva av. Línuleypurin er nú vorðin so sjáldsamur, at fólk neyvan kennast við hann, og hann er tí endaður á savni, har hann kann síggjast sum minni um ta tíð, tá hann var millum álitini í føroyska búskapinum

AFTURHVARV
*Edvard Joensen*

Hann er nú so gamal, at flestu fólk kennast ikki við hann meira. Men tað var tann tíð, tá teir í stórum tali stóðu undir hvørjum neystaveggi og undir tróðrinum í mongum hjalli í landinum. Línuleyparnir.

Línan varð rakt í kveylum niður í hann, meðan húkarnir snøggliga lið um lið vórðu settir á rimina, hvørja ferð, avegnt var. Tá so aftur skuldi egnast, varð hvør einstakur húkur aftur á hondum, og tá hann so var egndur, varð hann hongdur niður við rimini uttan. Onkur var so framkomin, at hann hevði gjørt sær eina lítla hill at leggja egnda húkin á.

Í mannaminni var útróðurin álit føroyinga á sjónum. Bara 130 ár eru síðan fyrsta sluppin til havfiskiskap varð keypt hendanveg.

Men framvegis hava føroyingar róðu út, og enn í dag er væl av útróðri kring landið, hóast parturin í dag er minkaður í mun til samlaðu veiðina.

Og neyvan duga vit í dag at ímynda okkum, hvussu verið hevur, tá teir í gomlum døgum fóru við leypinum oman í fjøruna at egna fyri síðan at rógva á fiskileiðirnar kring oyggjarnar at seta. Summir longri og aðrir styttri.

Í dag verður ikki egnt við sild ella hálvrotnari øðu, men við frystum, feskum agni. Og nógvir egna heldur ikki meira, uttan bara skera og leggja í eitt ílat til egningarmaskinuna at klára restina.

Og so kunnu vit sita og hugsa okkum til, hvussu nógv er broytt, og hvussu nógv betur tað er vorðið. Eingin ivi um tað.

So mikið meira eiga vit at virða tann gamla leypin, sum øll hesi árini gav okkara forfedrum tað, tey høvdu at liva av úr sjónum.

Hóast tað, at tað ikki var lukkuligt, tá heldur enn nú, at koma við nýggjum veiðihættum hendanveg. Føroyingurin er konservativur, sum eisini er sagt frá, tá línan fyrstu ferð skuldi roynast her um leiðir.

Komin skuldi hon vera við teimum, sum um miðja næstseinastu øld ella so vóru á rannsóknarferð í Hetlandi og Orkney.

Men tá hon skuldi roynast, mátti bóndin sjálvur seta, meðan bátsmenninir ivasamir hugdu at, men einki søgdu. Teir noktaðu ikki, verður sagt, men illneittust innantanna, tí nú óttaðust teir fyri, at hesin nýggi reiðskapurin fór at oyða teimum grunnarnar.

Og so brúktu teir kortini línuna í áravís soleiðis í leypi. Egndu tað, sum var at fáa. Gággu og øðu ivaleyst. Sild hava teir fingið og so okkurt annað fiskaagn sum ein steinbít ella tað, sum var at fáa.

Og línan varð egnd og sett. Hon stóð og fiskaði og varð so drigin aftur. Og hesa tíðina, meðan hon stóð, nýttu teir so til eitthvørt annað. Kanska egndu teir eina aðra línu, ella teir hildu snøri.

Teir sótu kanska bara niður á árarnar og hvíldu eina løtu, um veðrið var gott. Tosaðu um dagsins mál ella bara hvør sær hevði eina stilla løtu soleiðis fyri seg sjálvan.

Aðrar dagar var ivaveður, og teir sótu á varðhaldi. Hvør tægr spent. Alla tíðina klárir at fara til árar, skuldi eitthvørt borist á.

Kíkurin lá har og vóð í vatnskorpuni. Tað rak so mikið, at tað stóð rættiliga á honum. So ikki gjørdist annað enn at bíða, til rákið linkaði.

Hetta brædda kálvskinnið, sum teir høvdu flett í bjølg. Sett proppar í háls og bein, og har annars var eitt hol á, og síðan tjørað. Soleiðis varð alt gangnýtt. Eisini grindamagar og kópaskinn vórðu nýtt til flot.

Í dag er alt plastikk. Reyðar boyur, sum síggjast langt. Og tær hava stong og flagg. Og eisini ljós, so til ber at síggja tær í myrkri. Radarrefleks hava tær, og onkur peiliboya er eisini av og á ímillum.

Men gamli línuleypurin liggur nú fúnaður á onkrum neystalofti ella undir tróðrinum í onkrum hjalli. Línan er rotnað, og húskarni rustaðir. Um ikki alt er burturblakað.

Onkur hendinga verður kanska enn brúktur til eina hissini skrubbulínu. Men til ordiligan útróður verður hann ikki tikin framaftur. Og gott er tað.

Tí hóast vit eiga at virða og varðveita tað, sum fedrarnir settu sítt álit og grundaðu sína tilveru á, er tað kortini ein sannroynd, at tað gamla er farið og alt er vorðið nýtt. Og í flestu førum er tað nýggja hóast alt eitt framstig.

Tí er línuleypurin saman við gamla kálvakíkinum komin á sítt rætta pláss, tá hann í dag stendur í einum skuti á einum savni, har vit eiga at hyggja at honum, minnast og virða hann saman við teimum, sum brúktu hann.